Juni 2023

Nr. 2/2023

# Limabræv

starvsfelagið









## HEVUR TÚ VERIÐ FYRI HAPPING TIL ARBEIÐIS?

Vit seta sjóneykuna á happing á arbeiðsplássinum og vilja fegin hoyra frá tær, sum hevur upplivað happing. Møguligt er eisini at vera dulnevnd/ur.

SIG OKKUM FRÁ

## KUNNING UM LEIGUMÁL Í SMÆRUNI

Vit sendu kunning út til allar limir í farna mánað um leigumálini í Smæruni, sum fingu nakað av umrøðu í miðlunum. Les ella endurles kunningina her.

LES KUNNINGINA

## VEGLEIÐING: SUMMARFERIU-STARV

Hevur tú ella ein, sum tú kennir, fingið avloysarastarv í summarferiuni? Les meira um, hvat skal havast í huga, tá ein fær bjóðað feriustarv.

LES VEGLEIÐINGINA

## 37 TÍMA ARBEIÐSVIKA: HVAT HENDIR NÚ?

Starvsfelagið hevur saman við øðrum fakfeløgum lagt ynski fram um eina styttri arbeiðsviku í nógv ár og loksins eydnaðist tað at fáa ynskið við í eitt samgonguskjal. Hvat hendir so nú?

Landsstýriskvinnan hevur sett eitt trípartasamráð við umboðum frá arbeiðsmarknaðinum og politisku skipanini at umrøða málið, og hvussu farast skal fram. Formaður Starvfelagsins er eitt av umboðunum í samráðnum.

LES MEIRA UM SAMRÁÐIÐ





# STARVSFELAGIÐ VITJAR LIMIRNAR KRING LANDIÐ

Seinastu vikurnar hevur Starvsfelagið verið á vitjan á arbeiðsplássum í Havn. Vitjað hevur verið hjá Posta, Landfútanum, Heilsufrøðiligu starvstovuni, Tjaldurs Apoteki, Rúsuni, Bústøðum, Tórshavnar havn, Ellisheiminum og Tórshavnar kommunu.

Ein stórur partur av okkara limum starvast til dagliga í Havn og tað er torført at náa út til øll, men vit gera alt, vit megna fyri at vitja so nógvar limir sum møguligt. Vit hava fingið góða móttøku á øllum arbeiðsplássunum og vit eru sera takksom fyri blíðskapin.

Vitjanirnar eru framhald av rundferðini, sum byrjaði í fjør, har vit vóru á vitjan hjá okkara limum á arbeiðsplássum í Norðoyggjum, Eysturoy, Norðstreymi og Vágum.

Ætlanin er at taka vitjanirnar upp aftur í heyst, har fleiri arbeiðspláss í Havn, Sandoy og Suðuroy eru á skránni.

SÍ MYNDIR AV VITJANUNUM



starvsfelagið

## ÁLITISFÓLKA-FUNDUR Í HEYST

Álitisfólkafundurin, sum vanliga verður hildin í juni mánað, verður í ár hildin í septembur. Hetta er fyrri av tveimum árligum álitisfólkafundum. Seinni árligi álitisfólkafundurin verður væntandi í desembur.

Álitisfólk hjá Starvsfelagnum hava sambært sáttmálunum tveir álitisfólkadagar um árið við vanligari løn, sum tey verða bjóðað til. Fundardagarnir verða nýttir til kunning, undirvísing og ymiskt mennandi virksemi.

## VIT VILJA VERA GRØN

Starvsfelagið vil gera sín part í stríðnum ímóti veðurlags-broytingum. Tí hava vit orðað ein umhvørvispolitik, sum fevnir um orku, nýtslu og innkeyp í fyrstu syftu.

Eisini eru vit í ferð við at kanna møguleikarnar fyri grønum orkuloysnum til felagshúsini og Smæruna.

SÍ UMHVØRVISPOLITIKKIN

## KEYPIORKAN HJÁ LIMUM ER FRAMVEGIS HÓTT

Hóast inflatiónin í 2023 er lækkað nakað í mun til tølini frá síðst í 2022, so er keypiorkan hjá limum felagsins framvegis hótt.

Les ella endurles hvat tað hevur at siga fyri keypiorkuna hjá limum felagsins, at inflatiónin er lækkað pr. februar 2023.

LES GREININA HER

# HEILSAN FRÁ FORMANNINUM



Juni mánaði er komin væl áleiðis og vit eru farin um longsta dag. Summartíðin er í hæddini og flestu okkara eru farin ella fara skjótt í feriu. Eftir langan og onkuntíð strævnan vetur, er summarið og harvið ferian kærkomin. Frítíðin, sum er okkara, og sum vit kunnu brúka til júst tað, vit sjálvi vilja.
Áðrenn vit her í felagnum fara í feriu, hava vit eitt stutt limabræv til tykkara við stuttum tíðindum og upplýsandi tilfari.

Seinasta ár hevur verið merkt av kríggi í Ukraina og methøgari inflatión. Prísvøksturin hevur verið so himmalhøgur, at lønarvøksturin, sum í miðal liggur um 2% pr. ár, ikki hevur staðið mát við vøksturin. Okkara uppgáva er, enn sum áður, at tryggja, at limir okkara hava so góð lønarviðurskifti sum gjørligt, og tí liggur eitt stórt arbeiði fyri framman fyri at varðveita keypiorkuna hjá okkara limum.

Í løtuni verður arbeitt við at seta sjóneykuna á happing á arbeiðsplássinum. Í tí sambandi verður arbeitt við at seta eina kanning í verk at lýsa, hvussu stórur trupulleikin er við happing ímillum okkara limir. Kanningin byrjar væntandi, áðrenn vit fara í summarferiu og koyrir til fyrst í septembur. Fyrstu úrslitini av kanningini verða løgd fyri álitisfólkini á álitisfólkafundinum seinni í septembur, síðan verða nærri útgreinað tøl kunngjørd seinni í ár.

Í Starvsfelagnum síggja vit tað sum okkara skyldu at gera okkara part við burðardyggum virksemi og ynskja at gerast betri til at verja umhvørvið. Tí avgjørdi nevndin herfyri at orða ein umhvørvispolitikk, sum í fyrstu syftu umfatar orku-, nýtslu- og innkeypspolitikk. Í løtuni verður arbeitt við grønum orkuloysnum til felagshúsini. Meira um hetta kann lesast á heimasíðu okkara, har umhvørvispolitikkurin eisini er at finna.

Trípartasamráðið, ið landsstýriskvinnan við arbeiðsmarknaðarmálum, Ingilín D. Strøm, hevur sett í sambandi við at stytta arbeiðsvikuna við lóg, er farið til verka. Undirritaði er við í samráðnum og eri ómetaliga glaður fyri møguleikan at umboða almenna arbeiðsmarknaðin í arbeiðnum, sum liggur fyri framman. Hóast vit ikki kunnu siga nógv um arbeiðið í ráðnum, kann eg siga tað sama sum eg havi sagt fyrr, og vissa tykkum fyri, at vit í Starvsfelagnum framhaldandi arbeiða av øllum alvi fyri at stytta arbeiðsvikuna so skjótt sum gjørligt.

Fari við hesum at ynskja øllum eitt framhaldandi gott summar, vónandi við liggjandi góðveðri.



## FAKFELAGSTILTAK Á REINSARÍNUM

Starvsfelagið skipaði saman við feløgunum í Fakfelagssamstarvinum fyri forvitnisligum tiltaki á Reinsarínum í Havn fyri knøppum mánaða síðan. Vit varpaðu ljós á fakfeløg og teirra leiklut í samfelagsavbjóðingunum, sum vit standa yvir fyri við bústaðartrupulleikum og veðurlagskreppuni.

Skráin var á tremur við góðum undirhaldi og áhugaverdum kjaki. Vit eru fegin um, at tiltakið var væl vitjað, og ætla at skipa fyri fleiri slíkum tiltøkum framyvir.

SÍ MYNDIR AV TILTAKINUM HER

## STARVSFELAGIÐ FER Í SUMMARFRÍ

Skrivstova felagsins verður stongd í 3 vikur í summar, meðan vit í umsitingini halda summarfrí.

Skrivstovan letur aftur fríggjadagin 14. juli kl. 15 og letur upp aftur mánamorgunin 7. august kl. 9.

Í summarfrítíðini svarar telefonin ikki, men eru átrokandi boð, ber til at skriva til starvsfelag@starvsfelag.fo og vit venda aftur sum skjótast.